Auto Service:

# Gevið bilinum eitt feriueftirlit

Í summarferiuni eru tað nógv sum fara av landinum og út í heim at ferðast við bilinum. Tá er gott at hava ein bil sum virkar væl, so sleppast kann undan óneyðugum trupulleikum.

Í samband við koyring uttanlands hava Auto Service við Oyggjarvegin, sum umboða tey fýra bilmerkini Opel, Peugeot, Nissan og Saab, eitt fullfíggjað programm til feriueftirlit. Teir hava ein stóran nútímans mekaniskan verkstað við allari tí nýggjastu útgerðini til tey ymisku bilmerkini.

Í hesum eftirliti verður alt kannað sum t.d. motorolja, viskarabløð, sprinklaraveska, dekk og dekkstýst (eisini eykahjólið), bremsuveska og bremsuskivur- og belegningar, hondbremsa, stoytdoyvarar, tannreimin, og kølari og kølaraslangur saman við øllum kølisysteminum. Eisini verða allar perir og lyktir kannaðar og forlyktirnar stillaðar.

Eitt slíkt eftirlit kostar kr. 675,- v.mvg + tilfar, og tað er ein góð íløga, sum kann vera við til at tryggja eina feriu uttan trupulleikar við bilinum, sigur Otto Andreasen frá Auto Service

**mg**






















## Hevur tú tryggjað børnini?

Øll tryggja sær húsini. Bilurin má tryggjast. Og báturin... Men hvussu er við børnunum? Eru tíni børn tryggjað?

Ein barnavanlukkutrygging fevnir um likamsskaðar á tíni børn, elvdir av vanlukku. At barnið fær varandi mein er ein sorgarleikur í sær sjálvum, men harafturat kann tað verða ein fíggjarligur smeitur fyri familjuna. Hesum tryggjar vanlukkutryggingin ímóti.

Vit bjóða nú øllum børnum undir 18 ár ókeypis vanlukkutrygging tað fyrsta árið. Og tey næstu árini kostar hon eina ávísa upphædd um árið, sum er tann sama uttan mun til, hvussu nógv børn tú eigur.

Barnavanlukkutryggingin er galdandi alt samdøgrið. Bæði í heiminum, úti í spæli og í skúla.




Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari